## Erling Jacobsen brotið beinið

Erling Jacobsen hevur brotið eitt bein í fótinum, og skal ganga við skinnara næstu fýra vikurnar. Síðani er uppvenjing á skránni, sum væntandi tekur eini tvær til tríggjar vikur. – Tað var í einum lítlum nærdysti, har trýstið eftir øllum at døma gjørdist ov stórt, greiddi Erling Jacobsen frá um beinbrotið í sendingini 3. hálvleikur á Rás2 í gjárkvøldið. Tað var í steypafinaluni á ólavsøku, at Erling Jacobsen var so óheppin at verða skaddur, men um tað gongur eftir vild hjá honum, fær hann um endan á kappingarárinum við.



## Viðgera Christian Mouritsen í dag

Christian Restorff Mouritsen taldist millum áskoðararnar, tá B36 vitjaði á Toftum í gjár. Hetta tí, at Fótbóltssambandið onga støðu hevði tikið í málinum, um spæliloyvi hansara. Við Portalin í gjár segði Sveinur Tróndarson, formaður í Kappingarnevndini hjá FSF, at tey ynskja at kanna málið nærri, áðrenn nøkur niðurstøða verður gjørd. Hetta verður gjørt í dag, og so vónar Sveinur Tróndarson, at til ber at koma við eini niðurstøðu týsdagin.



Andy Olsen er av trimum í ÍF, sum er uppvaksin við Løkin í Runavík, har fuglfirðingar vitja í kvøld

NSÍ – B68:

# Trýst á báðum liðum

**Allir kappingarneytarnir hjá NSÍ vunnu í gjár, meðan øll liðini næst ÍF taptu og harvið er trýst á báðum portum í kvøld**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

HB, Víkingur og B68 vunnu øll sínar dystir í gjár. Hesi liðini eru tey, ið liggja omanfyri NSÍ á stigatalvuni. Á fimta plássið – beint aftanfyri NSÍ – liggur EB/Streymur, sum eisini vann sín dyst í gjár.

Harvið er trýstið á NSÍ rættiliga stórt, um teir ynskja at halda tørn millum fremstu liðini í deildini.

### Eru væl fyri

Til uppgávuna í kvøld, eru bæði lið væl fyri. Pauli Poulsen, venjari hjá NSÍ, segði við Rás2 í gjárkvøldið, at

### Munur á trýsti

Hinvegin er trýstið á ÍF ikki minni. Øll liðini, ið liggja aftan fyri ÍF á stigatalvuni, taptu sínar dystir. 07 Vestur, KÍ og AB fóru øll heim við ongum í gjár. Harvið hevur ÍF gyltan møguleika fyri at leggja sjógv í millum seg og áðurnevndu lið. Ein sigur hevði eisini havt við sær, at fuglfirðingar yvirhála B36 á stigatalvuni, sum jú eisini tapti í gjár.

Við øðrum orðum skal ÍF vinna fyri at sleppa frá hinum í botninum, meðan NSÍ skal vinna fyri yvirhøvur at fylgja við.

burtursæð frá onkrum smáskaðum, eru allir mans tøkir. Somuleiðis ásannaði hann, at frágongdin av Hjalgrím Elttør og Høgna Madsen og tilgongdin av Christian Høgna Jacobsen hava við sær, at liðið spælir nakað øðrvísi fótbólt nú enn áður.

Eisini fuglfirðingar eru væl fyri í kvøld. Tað er bara Hanus Eliasen, ið ikki fær spælt bólt í løtuni. Rógvi Jacobsen nærkast fullgóðari venjingarstøði, umframt at Nenad Saric eisini er tøkur aftur í kvøld.

### NSÍ í ÍF

Merkisvert við dystinum í kvøld er, at tá fuglfirðingar koma á vitjan hjá NSÍ, eru tað fleiri mans í og kring hópin hjá ÍF, sum eru uppvaksnir við Løkin í Runavík.

Andy Olsen skifti frá NSÍ til ÍF í fjør, og í ár hevur Øssur Dalbúð gjørt sama skifti. Umframt teir er eisini annar av venjarunum hjá ÍF, Abraham Løkin, NSÍ'ari.

Um hetta fer at hjálpa ÍF í dystinum í móti NSÍ í kvøld er ilt at siga, men fuglfirðingar hava havt tað ógvuliga trupult í móti NSÍ seinastu dystirnar.

# Fáið skil á

**Tað ber ikki til, at spælilovyi og mangul upp á sama ferð eftir ferð sleppur at grugga føroyskan fótbólt. Antin mugu feløgini læra hetta tann harða vegin, ella eisini mugu reglurnar broytast**



ÍTRÓTTARKLUMMAN
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Einki kappingarár uttan óskil um okkurt spælilovyið. Tað er reglan heldur enn undantakið, og aftur í ár hava vit fingið eitt av slagnum. Hesa ferð við Christian Restorff Mouritsen og B36, sum gloymdi at fáa spælilovyið við í pakkanum, tá spælarin skifti suður um miðlinjuna í Gundadali.

Hetta er eitt mistak, sum ikki eigur at koma fyri. Feløgini hava í dag partvíst lønta umsiting, og við fundamentala týdninginum, sum spælilovyið hevur sambært føroysku fótbóltslógunum, so er hetta bara nakað, sum ikki eigur at henda. Og tú skuldi trúð, at tá B36 áður hevur kloddað við somu reglum, so var hetta nakað, sum fekk upp aftur meira serligan ans.

Í ringasta føri kann hetta merkja, at Christian Restorff Mouritsen als ikki sleppur at spæla fótbólt aftur í ár, og tað vildi verið ein mest sum vanlukkuligur útgangur av málinum. Verður sammett við Tór-Ingar Akselsen málið hjá 07 Vestur í fjør, so kann verða, at B36 sleppur við bót, og at spælilovyið kortini verður útskrivað. Argumentatiónin hjá 07 Vestur var, at tað var eingin loyna, at spælarin hevði skift felag, og at ein úrtíðarflyting av spælilovyinum tí ikki gav nakran ítróttarligan fyrimun, sum var órættvísur mótvegis kappingarneytunum. Hartil hevði 07 Vestur eisini FSF-góðkendan sáttmála, og tí átók FSF sær eisini part av skuldini. Hetta seinasta hevur B36 ikki, men restina av argumentatiónini kunnu teir brúka. Og so ella so tænir tað ikki endamálinum um at fremja fótbóltin, um ein av bestu spælarum okkara nú verður læstur orsakað av tekniskum skrivaraborðsmistaki.

Hinvegin er tað væl skjótt ein spurningur, um feløgini ikki mugu læra tann harða vegin, at FSF-góðkenning av sáttmálum er einasti rætti vegurin at ganga. Og at tað eisini forðar fyri mistøk av hesum slagnum. Harðasti vegurin er avgjørt, um spælilovyið als ikki verður útskrivað, men tað kann eisini gerast við eini bót, sum er av somikið kraftigum slag, at hon veruliga merkist.

Men enn einaferð prógvar hetta eisini, at skipanin við spælilovyvum eigur at endurskipast í tráð við dagsins føroyska fótbólt. FSF hevði fyri trimum árum síðani uppskot um, at ALLIR spælarar í teimum báðum fremstu deildunum skuldu hava sáttmála. Líka mikið um krónutalið í hesum var 0. Verður hetta krav sett, kann sáttmálin samstundis telja sum spælilovyið, og so er skipanin brádliga so øgiliga nógv einfaldari at umsita. Argumentið hjá teimum, sum vóru ímóti, var, at tað heilt víst vóru spælarar, sum ikki vildu skriva undir slíkan sáttmála. Men vilja teir ikki tað, so vilja teir væl heldur ikki spæla fótbólt. Og so er ilt at ímynda sær, at venjarin skal tíma at gera nýtslu av somu spælarum.